# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 30. mars 2010




Wayne Rooney og Rio Ferdinand hava verið ivasamir, men eru helst báðir við í kvøld kortini

## Fjórðingsfinalur í kvøld

**Tvær av fjórðingsfinalunum í Champions League-kappingini verða spældar í kvøld. Onnur er millum Bayern München og hin er ein reinur franskur dystur millum Lyon og Bordeaux**




einsfistir@kalinet.fo

Hilmar Jan Hansen


Mong munnu minnast, tá Manchester United í Champions League-finaluni fyri 11 árum síðani vann á Bayern München við tveimum málum í evstu løtu. Nú hittast tey bæði stórfeløgini aftur, men hesa ferð í fjórðingsfinaluni í somu kapping.

Ein stórur spurningur hevur verið, um stóra stjørnan hjá United, Wayne Rooney, fór at verða klárur til dystin í kvøld, men hann er so við ferðalagnum. Somuleiðis er Rio Ferdinand, ið eisini hevur verið ivasamaur, við á ferðini.

Bayern München, sum óivað vil hevna tapið frá 1999, hevur helst Arjen Robben og Franck Ribery sum sínar størstu stjørnur. Ribery hevur verið nógv skaddur síðsta árið, men tykist vera komin fyri seg og byrjar helst í kvøld. Meira ivasamur er Robben, ið møguliga ikki verður við.

Hin fjórðingsfinalan í kvøld er ein rein fronsk uppgerð millum Lyon og Bordeaux. Lyon sendi Real Madrid úr kappingini og er favorittur at vinna dystin í kvøld. Lyon spardi fleiri av sínum bestu spælarum um vikuskiftið, men teir eru væntandi við í kvøld. Bordeaux tapti aðra av fronsku steypafinalunum um vikuskiftið, men er oddalið í Fraklandi, so her kann helst alt henda.

## Christian hitti Platini



Christian Andreasen, FSF-forseti, saman við Michel Platini, UEFA-forseta

**Trý umboð fyri Fótbóltssambandið hava verið á aðalfundi hjá europeisku fótbóltssamgonguni, UEFA**

Aðalfundurin var í Tel Aviv í Ísrael, og fyri Fótbóltssambandið vóru Christian Andreasen, FSF-forseti, Niclas Davidsen, starvsnevndarlimur, og Virgar Hvidbro, aðalskrivari, møttir á fundinum.

Har var høvi at hitta ymisk umboð fyri UEFA, FIFA og Kentaro, sum er fyritøkan, ið hevur sáttmála við Fótbóltssambandið um sjónvarpsrættindi. Eitt nú var fundur hildin við umboð fyri FIFA um øktar fíggingarmøguleikar til Fótbóltssambandið.

Eisini fekk nýggi forsetin í Fótbóltssambandinum, Christian Andreasen, hitt forsetan í UEFA, Michel Platini, sum bjóðaði Fótbóltssambandinum á fund í UEFA tann 6. mai. Á tann fundin fara forsetin og aðalskrivarin.

**hil**

## Badminton í Klaksvík

**Klaksvíkar Badmintonfelag spílar seg út og hevur havt stóra framgongd síðstu tvey árini**

Hóast felagið ikki er stórt, megnaði tað kortini at byggja Badmintonhøllina í Klaksvík, sum í dag er karmur um bæði badminton og nógvan annan ítrótt. Haraftrat hevur felagið í aðrar mátar ment seg, so tað hevur bæði kappingarnevnd, venjarar og eina rúgvu av virknum limum. Bara síðstu tvey árini er felagið vaksið úr 35 upp í 100 limir.

Ásannandi, at tað hevur nógv at siga, at foreldur og børn eru saman um ítróttin, skipaði Klaksvíkar Badmintonfelag leygardagin fyri familjudegi í høllini, har børn og vaksin hugnaðu sær við badminton, spølum og øðrum.

Tá føroyameistarakappingarnar vóru hjá teimum yngru, vann felagið seks heiðursmerki, harav trý vóru gull: Óli Poulsen (U9), Femja M. Jacobsen (U11) og Heðin Poulsen (U15).

Enn eru liðkappingarnar ikki lidnar, og Klaksvíkar Badmintonfelag hevur vónir um at vinna onkur heiðursmerki aftrat.

**hil**




Børn og vaksin hugnaðu sær í Badmintonhøllini leygardagin

Mynd: Dávur Winther

## Steypafinalan ikki á ólavsøku

Samráðingar hava verið millum Tórshavnar kommunu og Fótbóltssambandið um finaluna í kappingini um Løgmanssteypið, sum ætlanin var at spæla á ovara vølli í Gundadali, men ikki er eydnast at finna eina semju, so tí er greitt, at steypafinalan í ár ikki verður spæld á ólavsøku.

Í staðin er finalan flutt til sunnudagin 1. august, og tað hevur eisini við sær broytingar í Vodafonedeildini, tí har verður 16. umfar framskundað til 27. juli, umframt at onkur broyting eisini er í 20. umfari.

Somuleiðis er møguligt, at onkrar broytingar verða í 1. deild hjá monnum, um so er, at nakað av liðunum í næstbestu deildini spælir seg í hálvfinaluna í kappingini um Løgmanssteypið, tí har er seinna hálvfinalan flutt til 8. juni.

**hil**